# Standmyndin fær skap




*Rundkoyringin við Posthúsið í Klaksvík verður snøggað og broytt munandi, tá nýggja standmyndin verður liðug*

*Myndir: Høgni Thomsen*

**Hesar seinastu dagarnar hevur Heðin Heldarskarð arbeitt íðin við nýggju standmynd síni við rundkoyringina í Klaksvík**

STANDMYND

*Snorri Brend*

**Klaksvík:** Arbeiðið hevur gingið væl, og skal eftir ætlan verða liðugt til Summarfestivalin um ein slakan mánað.

Standmyndin er í roynd og veru í fýra pørtum ella fýra stórum steinum, sum peika í fýra ymiskar ætningar.

Tað serstaka við hesum er, at teir í fyrsta lagi venda sær móti teimum fýra høvuðsættunum og í øðrum lagi móti fýra av gomlu býlingunum í Klaksvík - í Vági, Myrkjanoyri, Gerðar og Uppsalar.

Í gjárkvøldið arbeiddi Heðin og ein hjálparmaður hansara við at leggja eitt »rør« úr rustfríum stáli, sum skal ímynda kjølin í einum báti.

- Aftaná fari eg at seta stavnar á steinarnar, soleiðis at teir koma at avmynda tann føroyska bátin, sigur Heðin.



*Heðin er komin væl áleiðis við standmyndini. Steinarnir eru fingnir úr fjøllunum og viga millum 400 og 500 pund hvør*

Summarfrí

16. juli – 3. august

Vegna summarfrí er avgreiðslan stongd frá mánadegnum 16. juli til fríggjadagin 3. august, báðir dagar íroknaðir. Opið verður aftur sum vanligt mánadagin 6. august.

Telefonavgreiðslan er tó opin mánadag til fríggjadag kl. 10:00 - 12:00. Eisini er møguligt at seta seg í samband við ALS um telefax ella teldupost.

Útgjøldini av arbeiðsloysisstuðli fyri skeið 14 og 15 verða avgreidd sum vanligt.

sansir.fo

ALS
Arbeiðsloysisskipanin
Postsmoga 3022 • FO-110 Tórshavn
Tel 349550 • Fax 349551
als@als.fo • www.als.fo




Boðað verður hervið frá at KJ Hydraulik og KJ Norð Trukk eru í summarfrí frá fríggjadegi 20. juli til mánamorgun 6. august.

Bert serliga átroðkandi uppgávur og veitingar vera avgreiddar. Nærri fæst at vita á telefon 40 70 00.

KREA.FO · TEL 478080

KJ HYDRAULIK POWER & MOTION CONTROL
P.O. Box 110 · Kambsdalur
Tel 40 70 00 · Faks 40 70 01

KJ NORÐ TRUKK TRUKKAR & LYFTIÚTGERÐ
Mykinesgøta 3 · Tórshavn
Tel 315136 / 515136 · Faks 310931